gult18 cyan18 magenta18 svart18







At seta føtur undir egið borð er altíð ein stór avgerð.
Tí er umráðandi at leita sær ráð og fígging, har hesi eru best.
Føroya Sparikassi hevur altíð lagt stóran dent á sethúsafígging og hevur tí eisini tann serkunnleikan, ið krevst, fyri at kunna ráðgeva viðskiftafólki sínum á besta hátt í sethúsamálum.
Ætlar tú at keypa grundstykki, byggja, keypa, ella umvæla hús, er ein góð byrjan at tosa við Føroya Sparikassa.

Tá er besta loysnin í eygsjón.

FØROYA SPARIKASSI
SETHÚSAFÍGGING


Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3170
Navn: Sp/f J. & V.
Adressa: Postbox 3189, 110 Tórshavn

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 01.06.2001
Viðtøkudato: 01.06.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Jón Finn Olsen, Oman Hoydalar 27, kj., Box 3189, 110 Tórshavn og Vinjard Johansen, Eystari Ringvegur 6, ovast, 100 Tórshavn.
Nevnd: Vinjard Johansen, Eystari Ringvegur 6, ovast, 100 Tórshavn (formaður), Jón Finn Olsen, Oman Hoydalar 27, kj., Box 3189, 110 Tórshavn, Bjarta A. Olsen, Oman Hoydalar 27, kj., Box 3189, 110 Tórshavn og Ann Maria Johansen, Eystari Ringvegur 6, ovast, 100 Tórshavn.
Stjórn: Jón Finn Olsen, Oman Hoydalar 27, kj., Box 3189, 110 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum- av nevndarformanninum ella av allari nevndini í felag.
Grannskoðari: : P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.06.2001 - 31.12.2001
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil og heilsøluvirksemi og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 8. juni 2001

Kristin Balle

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg





## Hús í Danmark til sølu

Hesi sera spennandi húsini við stórum nýgjørdum hava, við innigyrdum svimjihyli verða seld, innbúgvið kann fylgja við.

Húsini eru 130 m² og hava 3 kømur, stovu við brenniovni, køk, baðirúm við gosbaði, vaskirúm , 50 m² úthús/garaga, 12 m² gestahús við soviplássi.

Grundstykkið er uml. 1.000 m².

Húsini standa sera væl fyri í Varde, Jylland, uml. 1 tíma frá Lego-land og Løveparkini, 15 min. frá Vesturstrondini, 15 min. frá Esbjerg.
Prísuppskot: 995.000 Kr.

**Tlf. 322 999 fartlf. 225 345**



## SOLAR FØROYAR

Starvsfólk søkist at byrja skjótast.

**Starvið fevnir um:**
Søla av EDV - Tele - PLC og allar vanligar el-lutir

**Krøv:**
· Arbeiða sjálvstøðugt
· Góð samstarvsevni
· Áhuga fyri avbjóðingum
· Kunnleika innan handil hevur fyrimun

**Vit bjóða:**
Eitt spennandi starv við nógvum fjølbroyttum uppgávum

Fyrispurningar og umsókn verða at senda til

**Solar Føroyar**
Postboks 105
Brekkutún 2
188 Hoyvík
Tlf. 357933



Zarepta - 2001

Tekning til bíbliuskeiðið og hesar vikuskiftislegur fer fram í Zarepta, á tlf. 332140:

| | Frá | Til |
|---|---|---|
| Lega fyri einlig | Fríg. 22.06. | Sun. 24.06. |
| Lega fyri 18 ár og eldri | Hós. 16.08. | Sun. 19.08. |
| Bíbliuskeið | Sun. 26.08. | Sun. 02.09. |
| Mansstevna | Sun. 14.09. | Sun. 16.09. |
| Kvinnustevna | Sun. 21.09. | Sun. 23.09. |

*Verði vælkomin!*


gult19 cyan19 magenta19 svart19



# Todi hevur verið fantastiskur

**Todi hevur allar dygdirnar at standa seg í stóru útlendsku deildunum, heldur Roy Hodgson**

DM-GULL
*Álvur Haraldsen/Jákup Mørk - Parken*

Tað var ein sera fegin Roy Hodgson, sum gav sær góða tíð til tíðindafólkini eftir dystin sunnudagin. Orsøkin til hetta var sjálvsøgd. í fyrsta ári sínum sum venjari hjá FCK hevði navnframi onglendingurin ført liðið til gull, og sjálvandi vildu tíðindafólkini hava at vita, hvørjar orsøkirnar til hetta vóru.

Tá venjarin varð varugur við, at føroysk fjølmiðlafólk eisini vóru á staðnum, vildi blíðskapurin ongan enda taka.

## Fantastiskur

Við føroyskum eygum er sjálvandi serliga áhugavert, hvørja hugsan venjarin hevur um føroyska álopsessið hjá sær, og spurdur um hetta, var svarið púra greitt, at Todi hevur verið ein sera týðandi liður í gullmerkjunum.

- Todi hevur verið fantastiskur fyri okkum í ár. Hann er ein veruliga stórur spælari, og hann er eisini eitt gott menniskja. Hvørja ferð eg hugsi um Føroyar ella føroyingar fólkum, so hugsi eg um Toda. Hann hevur snøgt sagt verið fyrimyndarligur.

Spurdur, um hann saknaði Toda undan dystinum sunnudagin, segði venjarin, at tað kundi hann neyvan loyva sær at siga.

- Sigi eg tað, so sigi eg samstundis, at hinir áleypararnir ikki eru nóg góðir, og tað havi eg so onga orsøk til at siga. Tað er tó einki at ivast í, at Todi eigur sín stóra part í hesum. vit hava spælt 32 dystir fyri at røkka hesum, og Todi hevur jú verið við í einum 25 ella 26 av teimum, so hansara partur liggur so avgjørt ikki eftir.

- Eg kann tó ikki siga nakað um, at eg saknaði hann. Simpson, Fernandez og Zuma gjørdu jú allir eitt ótrúliga gott arbeiði í dag. Vit hava fýra sera góðar áleyparar til tvey pláss á liðnum, men sjálvandi royndu vit at fáa Toda kláran. At vit arbeiddu so nógv við skaðanum hjá honum, sigur eisini nakað um, hvussu fegnir vit vildu hava hann kláran, men tað gekk so ikki. Tíverri.

*Hann er ein veruliga stórur spælari, og hann er eisini eitt gott menniskja, sigur Roy Hodgson um føroyska álopsessið*



## Hevur allar dygdirnar

Sum kunnugt, so er FCK venjarin ein royndur harri, sum hevur verið víða hvar sum venjari. Royndirnar úr m.a. Inter og Blackburn eru sjálvandi nógvar, og tí átti hann eisini at vita, hvat hann tosar um, tá metast skal um ymsu leikararnar. Spurdur, hvussu tað ber til, at hann er at síggja í einum felagið sum FCK, sum í altjóða høpi er eitt hampuliga lítið felag, sigur hann, at so lítlir eru teir heldur ikki.

- Vit hava 41.000 áskoðarar í dag, og tað er í øllum førum tekin um, at vit ikki eru heilt so lítlir. Um vit kunnu standa okkum í Europa, er so ein onnur søga, men við at vinna okkara egnu deild, hava vit so syrgt fyri, at talan verður um europeiskan fótbólt í heyst.

- Tað at vinna sína egnu deild, er so fyrsta stigið í so máta. Tað fer undir øllum umstøðum at taka langa tíð, áðrenn FCK verður eins stórt sum Real Madrid, og kanska verða vit ongan tíð so stórir. Hinvegin er tað eingin loyna, at eg gleði meg til at sleppa at spæla ímóti slíkum feløgum.

At enda spurdu vit Roy Hodgson, um Todi Jónsson eftir hansara tykki er ein leikari, sum veruliga kann koma langt í yrki sínum.

- Tað er einki at ivast í, at hann kundi verið komin til stóru feløgini í stóru deildunum. Nú, tá hann nærum er vorðin 30 ár, verður hetta tó sera torført hjá honum. Eisini tí hann ofta hevur trupulleikar av skaðum.

- Hinvegin skal eg siga, at spyrt tú meg, um Todi hevur tær dygdir, sum skulu til fyri at standa seg í ensku premier-league ella í italsku seriu A, so er svarið ja. Tað hevur hann so avgjørt dygdirnar til.

# Mamman var og hugdi

**Hanna Adam Jónsson var sjálvsagt ovurfegin, tá tað sunnudagin var greitt, at Todi Jónsson og teir í FCK hava tryggjað sær gullmerkini**

DM-GULL
*Jákup Mørk*

Millum mongu føroysku áskoðararnar, sum sunnudagin vóru í Parkini, var eisini mamma Toda Jónsson, Hanna Adam Jónsson. Hóast hon ikki slapp at síggja sonin royna seg, frøddist hon um úrslitið, og eins og hinir áskoðararnir hevði eisini hon havt eina risa stóra uppliving.

- Tað var kanska eitt sindur ringt í byrjanini, tí Todi ikki var við, men hann kom so á vøllin seinni, tá alt skuldi feirast. Spenningurin var eisini øgiliga stórur hjá mær, tí eg visti, hvussu glaður Todi fór at vera, um hetta fór at lukkast hjá teimum.

Hetta er ikki fyrsta ferðin, at Hann er í Danmark at hyggja at fótbólti.

- Nei, vit plaga at fara niður soleiðis av og á. Hetta er triðja ferðin hjá mær hetta kappingarárið, og annars hava fleiri í familjuni verið og vitjað. Eg haldi eisini, at Todi er fegin um vitjanirnar, tí so veit hann, at vit øll stuðla honum.

## Keypti nýggja parabol

Hanna sigur annars, at hon alla tíðina hevur fylgt sera væl við, hvussu tað hevur gingist hjá soninum.

- Nú hevur Todi spælt fótbólt síðani hann var seks ára gamal, og eg havi altíð fylgt væl við. Bæði meðan hann spældi við KÍ og B36 fylgdi eg altíð væl við, og sjálvandi havi eg eisini gjørt tað, meðan hann hevur spælt niðri.

- Sjónvarpið plagar jú at senda frá dystunum, men vit máttu so keypa eina størri parabol, fyri at síggja 3+. Teir senda jú beinleiðis frá fleiri dystum, og tá so er, sita vit øll heima í stovuni og fylgja við. Seinni um kvøldið er Onside, so sunnudagarnir hjá okkum fara aloftast fram framman fyri sjónvarpinum.

Eins og flestu hinir føroyingarnir í ferðalagnum, so fór Hanna heim til Føroya mánadagin. Hóast hon væl kundi hugsað sær at sæð seinasta dystin í Odense, so hevur hon ikki stundir til hetta, men nú hevur hon so fingið vissu fyri, at sonurin er vorðin danskur meistari.




*Tað var ein errin mamma, sum sunnudagin kundi staðfesta, at sonurin er vorðin danskur meistari í fótbólti. Við liðina av Hannu stendur versonurin, Georg Rasmussen, sum eisini var komin at hyggja at dystinum*
*Mynd: Jonhard Hammer*